Klaksvíkingar í gullrúsi

Annað árið á rað hevur Klaksvíkar Klubbi við teimum trimum "musketerunum" Kristian Suna, Sonhard og Ólavi vunnið føroyameistaraheitið í billard fyri lið. Silvur og bronsukappingin stendur millum Vágs Billardfelag, Kaggan og Billardfelag Fuglafjarðar.

BILLIARD
Tíðindaskriv

Klaksvíkar Klubbi er Føroyameistari í billard fyri lið. Hetta hendi tá teir seinasta vikuskifti vunnu 14-4 á Tvøroyrar Klubba. Hetta er annað árið á rað, at klaksvíkingar fara við gullinum. Teir vórðu so nógv bestir, fingu tilsamans 71 stig .

Liðið hevur havt eina sera stabila og javnt sterka manning hesi bæði árini við Kristian Suna Høgnesen og Sonhard Johannesen, sum hava spælt í nógv ár og so heldur nýggja spælaranum Ólavi Kjølbro, sum í ár gjørdi tað bragd at vinna allar sínar dystir. Teir høvdu eisini allir eitt sera gott meðaltal fyri alla kappingina. Í hesi seinastu kappingini var tann tann ungi Ólavur, sum gjørdist bestur og við einum meðaltali uppá nærum 24 eygu.

Ein dystur varð so eisini spældur niðastu plássini. Havnar Klubbi vann 10-8 á Fuglafirði men tað var ikki nóg mikið at sleppa undan niðurflyting. Næstaseinata vikuskiftið vunnu fuglfirðingar 12-6 á tvøramonnum og tryggjaðu sær tá at blíva verandi í bestu deildini. Kaggin og Vágs Klubbi skuldi spæla hin seinasta dystin leygardagin. Men tann dysturin var ikki spældur, tí vágbingar møttu ikki upp. Óvist er nær tann dysturin verður spældur.

Nú tað er greitt, at klaksvíkingar eru føroyameistarar í billard fyri lið er púra opið hvør fer við silvurinum og bronsuni, nú dysturin millum hini liðini í oddinum, Kaggan og Vags Billardfelag ikki er spældur. Undan hesum dystinum er støðan tann, at Vág hevur 47 stig, Billardfelag Fuglafjarðar hevur 37 stig, Kaggin hevur 35 stig. Tvøroyrar Klubbi hevur 34 stig og Havnar Klubbi hevur 28 stig. Kappingin um silvur og bronsu verður so millum Vág, Fuglafjørð og Kaggan.

Støðan í 2. Deild er í løtuni tann, at Havnar Klubbi er á odda við Kagganum í hølunum. Vinnur Havnar Klubbi 2. Deild, so verður felagið verandi í 1. Deild, men tað er óvist, nú fleiri dystir eru eftir at spæla í 2. Deild og Kaggin hevur ein dyst meira at spæla enn Havnar Klubbi. Nr. 3 í 2. Deild er Fuglafjørð, nr. 4 og 5 eru Vágslið og aftast er Tvøroyrar Klubbi.

Í 3. deild er støðan tann, at Kaggin liggur á odda, nr. 2 er Klaksvíkar Klubbi, nr. 3 er Vágs Billardfelag, nr. 4 er Tvøroyri og aftast Havnar Klubbi. Her eru eisini fleiri dystir eftir at spæla.

Innleiðandi umfarið til einstaklingakapping í billard verður I Havn 28. Og 29. Mars. Freistin at tekna seg hjá Billardsambandinum er úti 22. Mars. Finaluumfarið verður vikuskiftið 4. Og 5. Apríl. Tað er ikki endaliga avgjørt, hvar tað verður spælt.

Úrslit annars:

Havnar Klubbi og Vág 2 í 2. Deild. Her vann Havnar Klubbi 16-2. Jógvan Jørgensen varð nr. 1 við umleið 12 eygum og fullum stigatali. Nr. 2 var Terje Sigurðsson og nr. 3 Høgni Højgaard. Bestur hjá vágbingum var Birni Kjærbæk.

Vág vann 13-5 á Fuglafirði í 1. Deild. Bestur var Birgir Jacobsen við fimm stigum og 21 í meðal. Besti fuglfirðingur var Jens Feilberg. Í 3. Deild var ein dystur millum Kaggan og Havnar Klubba. Kaggin vann 18-0. Besti maður á Kaggalinum var Jón Ellingsgaard. Sama lið Kaggans vann so eisini 10-8.

A Klaksvíkar Klubba. Bestur var Anfinn Hjalmarson.

Í 2. Deild vann Kaggin 12-6 á Vág 2. Bestur var Johannes Skaarup.

Í 1. Deild vann Vág 16-2 á Havnar Klubba. Tórur Holm var besti maður við nærum 24 eygum í meðal. Carsten Hansen úr Havnar Klubba hevði annars fleiri góð spøl. Eitt var uppá 716 eygu.

FM fyri lið í borðtennis

BORÐTENNIS
Tíðindaskriv

FM fyri lið í borðtennis hevur um vikuskiftið verið í ítróttarhøllini í Trongisvági.

Úrslitini vóru hesi:

Pinkur

Nr. 1	Rakul Mikkjalsdóttur / Susie Midjord	TBF
Nr. 2	Joan Thomasen / Sheila Strøm	TBF
Nr. 3	Rannvá Joensen / Lillian Olsen	TBF

Smágentur

Nr. 1	Mariann Mikkjalsdóttur / Marin í Dali	TBF
Nr 2	Anntóra Láadal / Rudi Zachariassen,	Streymur
Nr. 3	Jónvør Joensen / Wivika Strøm	TBF

Gentur

Nr. 1	Mildrið Djurhuus / Rakul Magnussen,	Streymur
Nr. 2	Tanja Holm / ?,	TBF
Nr. 3	Eydna Jespersen / Vár Hansen,	TBF

Kvinnuunglingar

Nr. 1	Elisa Abrahamsen / Maria Zachariassen,	Streymur
Nr. 2	Birita Joensen / Elisabeth Jacobsen,	Streymur

Smápiltar

Nr. 1	Jónard Ferjá / Jákup Thomasen	TBF
Nr. 2	Teitur Justinussen / Rógvi Joensen	TBF
Nr. 3	Ragnar Joensen / Páll Heri Nolsøe	TBF

Piltar

Nr. 1	Fróði Jensen / Gilli Sørensen	TBF
Nr. 2	Hallur Thorsteinsson / Reidar Luid	TÓR
Nr. 3	Heini Mortensen / Kjartein Niclasen	TBF

Smádreingir

Nr. 1	Sjúrður Ferjá / Gunnar í Dali	TBF
Nr. 2	Bárur Láadal / Hallur Djurhuus	Streymur
Nr. 3	Hallur Kjærbech / ?,	TBF

Dreingir

Nr. 1	Sigurð Carlsson / Ragnar Egilsson	TÓR
Nr. 2	John Hansen / Christian Mouritsen	TÓR
Nr. 3	Hanus Stórhamar / Aron Sørensen	TBF

Mansunglingar

Nr. 1	Allan Smedemark / Sjúrður Thorsteinsson	TBF

Meðaldeildin

Nr. 1	Høgni Carlsson / Rógvi Hansen	TÓR
Nr. 2	Kai Roest / Ragnar Nolsøe	TBF

Meistaradeildin

Nr. 1	Petur Niclasen / Eyðun Luid	TÓR
Nr. 2	Fríði Jensen / Vagnur Nolsøe	TBF

Øll suðuroyarliðini vunnu

Argjamenn vunnu í Fuglafirði eftir brotssparkskapping

LØGMANSSTEYPIÐ
Páll Holm Johannesen

Øll suðuroyarliðini vunnu sínar dystir í fyrsta undan umfarið í kappingini um løgmanssteypið. Royn stóð fyri mest óvæntaða úrslitinum, tá teir vunnu 2-1 í Leirvík. Kristian í Vági legði heimaliðið frammum, men hvalbingar svaraðu aftur við tveimum málum, og vunnu sostatt 2-1.

Á Sevmýri fingu tvøramenn vitjan av FRAM. TB vann heili 8-0, eftir hálvleiksstøðuna 5-0. Rættiliga stórur munur var á liðunum allan dystin, og talan var um rættiliga uppvísning frá heimaliðnum

Sumbingar máttu út brotssparkskapping, áðrenn teir loksins vunnu seg fram í annað undan umfarð. Dysturin millum B71 og Sumba var javnur, og tá 90 minuttir vóru farnir stóð 1-1. Bæði málini komu í seinna hálvleiki.

Veteranur Eli Hentze legði B71 á odda, meðan Eirik Joensen svaraði aftur fyri sumbingar. Onki mál kom í umdystinum, og sumbingar gjørdist teir drúgvaru brotssparkskappingini, sum teir vunnu 4-3.

Uppflytararnir AB vitjaðu ÍF sunnudagin. Dysturin endaði málleysur, og eftir heili átta brotsspørk í part, vann AB 7-6.

Úr Fuglafirði verður sagt, at úrslitið ikki var heilt rættvíst. Heimaliðið hevði yvirvág á spæli stóran part av dystinum, men bólturin vildi ikki í mál. AB leikti stóran part av øðrum hálvleiki við tíggju monnum, tí málverjin nýtti neyðbremsuna tíðliga í øðrum hálvleiki.

Úrslitini í 1. undanumfari í kappingini um løgmanssteypið:

TB-FRAM 8-0 (5-0)
Kaj Roest 3, Dan Mortensen, Jón Johannesen, Olivur Abrahamsen, Bárður Dimon, Vladimir

LÍF- ROYN 1-2
1-0 Kristian í Vági
1-1 sjálvmál
1-2 Hanus Toftheyggj

B71-Sumba 1-1 (0-0) ,
Sumba víðari eftir brts.
1-0 Eli Hentze
1-1 Eirik Joensen

ÍF-AB 0-0 (0-0), AB víðari eftir brts.

Dystirnir í øðrum umfari komandi vikuskiftið:

Sumba- AB
TB-ROYN

NM-landsliðini sett

Tíðindaskriv

Landsliðið, sum skal umboða Føroyar í opna raðnum í NM-2003 í bridge er nú sett.

Spælararnir eru hesir:

Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen
Jóannes Mouritsen – Heðin Mouritsen
Per Kallsberg - Dánjal Pauli Mohr

Venjari og liðskipari er Svend Novrup, sum hevði framúr góð úrslit við føroyska landsliðnum í Itaiu í fjør summar.

Svend sigur sjálvur frá, at við royndunum frá EM-2002 afturat tí støðuga góða spælinum, sum fyrstnevndu 4 spælararnir hava vístí heimligu kappingunum í vetur, var ongin trupulleika at seta teir á liðið.

Síðani vóru 2 pør, sum aspireraðu um landsliðsplássi, nevniliga Per og Balle og harafturat ungu spælararnir Gunnar Mouritsen og Høgni Vesturklett.

Hesir seinru hava vístein einastandandi spæl til tíðir og hava evnini og viljan, sum skal til fyri at tryggja sær eitt pláss á landsliðnum. Tó helt hann teir vera ov ungar og óroyndar enn í mun til Per og Balla, sum hava drúgvar landsliðsroyndir m.a. í NM-høpi á baki.

Fyri at menna ungu spælararnar verður nú kannað, um fíggjarligir møguleikar eru fyri at senda hesar til Junior-Camp og VM fyri junior-pør, sum verður í Bulgaria í summar.

Kvinnuliðið

Aspirantarnir til kvinnuliðið vóru bert 3 pør, og tá hetta er talið av spælarum, sum loyvt er at nýta, var liðið í veruleikanum sett frá byrjan við hesum trimum pørunum, har 5 av spælarunum vóru á EM-landsliðnum í Italiu (Henriette Svenstrup kundi ikki verða við tá).

Marjun Restorrf - Arnleyg Mikkelsen
Jóna Grunnveit - Henriette Svenstrup
Laila Danielsen - Maria Christiansen

Venjari og liðskipari er Marner Joensen.

VARPIÐ
Skráir og ummælir Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2